Innlendismálaráðið

# Løgfrøðingur til Innlendismálaráðið

Innlendismálaráðið søkir við hesum eftir avloysara fyri løgfrøðing í barnsburðarfarloyvi.

Talan er um spennandi og fjølbroytt starv innan umhvørvis- og lendisøkið, har viðkomandi fer at arbeiða við nógvum ymiskum málum, serliga innan lóggávu, ið snýr seg um:

- umhvørvisvernd og havumhvørvi
- persónskráseting, tinglýsing, matrikulering og sundurbýti
- býarskipanir og byggisamtyktir

Tann, ið verður settur, skal veita løgfrøðiliga ráðgeving innan omanfyri nevndu málsøki, vera við til at gera uppskot til lógir og kunngerðir og sjálvstøðugt viðgera mál, ið eru tengd at nevndu málsøkjum.

**Førleikar**
Umsøkjarar skulu hava løgfrøðiligt embætisprógv og vera væl fyri málsliga. Eisini vænta vit, at tú hevur góð samstarvsevni, arbeiðir sjálvstøðugt og miðvíst.

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og BLF.

Starvið verður sett skjótast gjørligt. Vilt tú hava meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Eyðbjørn Larsen, deildarstjóra, á telefon 358080.

Umsóknir við CV, prógvum o.ø. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 29. oktober 2007 kl. 12.00.

Umsóknir skulu sendast til:
**Innlendismálaráðið**
Tinganes
Postboks 159
110 Tórshavn

Í Innlendismálaráðnum starvast í løtuni 16 fólk. Innlendismálaráðið umsitur m.a. lógarmál, kommunumál og umhvørvis-, lendis- og náttúrumál.

FØROYA LANDFÚTI
POLITIMEISTARIN
Smyrilsvegur 20 · Postboks 3018
FO-110 Tórshavn · Tlf. 35 14 48

# Pass

**Passframleiðslan fyri alt landið fer fram í Danmark og er passavgreiðslutíðin umleið 2 til 3 vikur.**

**Vinaliga biðið tí um passið í góðari tíð.**

Umsókn um pass fæst á Fútaskrivstovuni, Smyrilsvegi 20, Tórshavn, á heimasíðuni www.politi.fo og á øllum politistøðunum uttanfyri Tórshavn.

Umsóknin kann latast inn við at venda sær persónliga til Fútaskrivstovuna í Tórshavn ella til eina av politistøðunum uttanfyri Tórshavn.

Skjøl at hava við, tá pass verður umbiðið:

- Gamla passið
- Dóps-, føði- ella navnaseðil og møguligt vígslubræv
- Nýggja passmynd stødd 35 x 45 mm

Passið skal gjaldast, tá tað verður umbiðið.

| | |
|---|---|
| Persónar millum 18 ár og 67 ár | kr. 400,- |
| Persónar yngri enn 18 ár | kr. 115,- |
| Persónar, sum eru fyltir 67 ár | kr. 150,- |

**Gjørt verður vart við, at eftir 1. oktober 2004 kunnu børn, sum eru undir 15 ár, ikki longur verða innskrivað í pass hjá foreldrum ella øðrum, og skulu tí hava egið pass.**

**Nærri fæst at vita við at venda sær til Fútaskrivstovuna – tlf. 351448 – ella politistøðirnar.**

**FØROYA LANDFÚTI**

***tann 17. oktober 2007***
***Karen Marie Olesen***





# Hús í Klaksvík til sølu

## um nøktandi boð fæst

Húsini standa á Garðavegnum 17

Húsini eru 94 m² í 2 hæddum umframt eitt kjallarrúm á 19m². Húsini eru bygd 1967

Húsini eru øll gjørd av nýggjum innan 2006-2007 millum annað

Nýggjur køkur frá 2006.

Nýtt baðirúm við flisum á gólvi og veggjum.

Parkett á øllum gólvum

**Tel 210689**

Hoyvíkar Skúli

# STUÐULSFÓLK TIL HOYVÍKAR SKÚLA

Søkt verður eftir einum stuðulsfólki til tveir næmingar við serligum tørvi í 3. flokki at byrja 15. november.

Stuðulin arbeiðir saman við lærarunum í flokkinum.

Fyrimun hava umsøkjarar við viðkomandi útbúgving og royndum.

Løn sambært sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlastjóran, Birgit Arge á telefon 302590 ella 227603.

Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum í hendi seinast mánadagin 5. november klokkan 12.

**Hoyvíkar Skúli**
Vegurin Langi
Postsmoga 3073
110 Tórshavn

# Frá Fuglafjarðar skúla

Felags foreldrafundur verður í fimleikahøll skúlans **mánakvøldið 29. okt. kl. 19.00**

**Skrá:**

1. Ársfrágreiðing frá skúlastýrinum
2. Trivnaður og umsorgan.

Pól Jákup Thomsen, ráðgevi á Heilbrigdi, greiðir frá

Eisini verður høvi at hoyra næmingar syngja, eins og stutt myndafrásøgn um skúlans virksemi verður sýnd!

**Hjartaliga vælkomin!**

**Fuglafjarðar skúli og Skúlastýrið**



# LOYSNIN!

**...ein lykil til alt húsið, virkið ella skúlan !!**

**Vit loysa lás- og lyklatrupulleikar.**

**Vit eru serkønir í at gera:**

Ruko systemlás · Skipan av lásum
Umvælingar · Skera lyklar til · Umskipa

**TÓRSHAVNAR LÁSASERVICE**
v/Jahn Petersen
**TEL 310 411 · FARTEL 215 411**
teldupostur: lasasmid@post.olivant.fo